# Sonni finnur friðin á Norðtoftum

**- Eg havi tað gott í allar mátar. Eg eri ongatíð sjúkur, taki onga tablett og livi sum fiskurin. So eg havi onga orsøk at klaga um nakað, sigur 73 ára gamli Sonni Frederiksen úr Havn. Hóast sín høga aldur brúkar hann ein góðan part av frítíð síni í bygdini Norðtoftum á Borðoynni**



*- Eg havi altíð havt góða heilsu. Eg minnist meg bara at hava verið eina ferð sjúkur. Tað var tá tann tiltikna Hongkong-sjúkan herjaði. Men tá lógu eisini rættiliga nógv fólk sjúk, sigur tann virkisfúsi Sonni Frederiksen, sum nýtir ein stóran part av frítíð síni her á Norðtoftum*

## Bygdarlív



**Snorri Brend**
snorri@sosialurin.fo
myndir: Jens Kristian Vang

**Norðtoftir**: - Ja, eg var komin í bilin, tá eg sá tykkum koma. Kom endiliga innar, so skal eg vísa tykkum hesi skjótt 100 ára gomlu húsini. Eg fari bara til Sørvágs einaferð seinni í dag, sigur hesin tilaldurskomni, men kortini virkisfúsi maðurin.

Veðrið er av tí allar fagrasta henda dagin í august mánaði. Fólk síggjast hoyggja í Norðtoftum, men Sonni hevur kortini aðrar ætlanir henda dagin.

Annan dagin fyri hevði hann sligið ein teigin og hevði ballað ein part av grasinum í gjár. Ætlanin var at halda fram við hesum í dag, men hetta varð kortini ikki av nøkrum, hóast veðrið avgjørt var til slíkt virksemi.

- Satt at siga, at var eg ov troyttur at gera tað í dag. Eg segði við meg sjálvan í morgun, at tað gerst ikki við um alt ikki verður ballað í dag.

- Nú er so lítið eftir, bara einar 20 ballir. So tað er eingin orsøk at øsa seg upp um tað, sigur Sonni Frederiksen við einum brosi.

Ístaðin var hann á veg vestur í Vágar at vitja sonin, tá umboð fyri Sosialin koyrdu framvið norðastu húsunum á Norðtoftum.

- Nú er jú einki fyri at koyra vestur til Sørvágs, sigur hann.

> *Eg segði so við Sofus, at vit áttu bara at flett lambið beinanvegin, men hann segði nei: »Sunnudag fletta vit einki lamb!«. So tað varð ikki gjørt henda dagin*

### Norður um Múlan

Hóast Sonni Frederiksen hevur búð meginpartin av lívi sínum í høvuðsstaðnum, so hava bondini til hesa lítlu og fjarskotnu bygdina á Borðoynni altíð verið sterk og eru tað enn.

Pápi hansara var bæði føddur og uppvaksin her, og gjørdi hetta sítt til, at Sonni longu sum smádrongur kom til bygdina – og ikki minst í seinni árum.

- Vit komu norður hendavegin við báti, og sovítt eg veit, var tað »Streymur« sum førdi okkum til Klaksvíkar. Men akkurát hvussu vit komu til Norðtoftar minnist eg ikki, sigur hesin væl-til-árs-komni-maðurin, men við tí unga sinninum.

Ferðasambandið fyri 70 árum síðani var sjálvandi ikki eins gott og tað er nú: Ætlaði tú tær úr Havnini og til Norðtoftir, so var neyðugt at liggja nátt á leiðini, tí